# Á BLÁMAN Í FØROYSKUM UNDIRKLÆÐUM

**MENTANARVIKAN** Á **SKÁLAFJØRÐINUM** ENDAÐI VIÐ **SVIMJING** Á SJÓNUM, OG Í TÍ **SAMBANDI** HUGLEIDDI **HAVNAMEISTARIN** UM **UMSTØÐURNAR** AT **SVIMJA**, ÁÐRENN HANN LEYP Á **BLÁMAN** Í FØROYSKUM **UNDIRKLÆÐUM**



**HAVSVIMJING**
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Mentanarvikan í Runavík endaði við einum tjumsi á sjálvum Skálafjørðinum. Seinasta dagin í oktober mánaði høvdu leiðarin á Kunningarstovuni, Herbjørg Jøkladal, og svágarskapur hennara Vanja Justinussen skipað fyri havsvimjing – ella fjarðarsvimjing – sum man vera tað rættara í hesum førinum.

Komið var nakað væl út á hendan seinnapartin sunnudagin, tá fólk í hópatali úr øllum landinum møttust í gamla saltfiskahúsinum hjá Napoleon á Glyvrum - á Langanesi, sum var snákað nakað væl til, nú hetta nýbrotið skuldi fara av bakkastokki. Kaffi og køkur í ríkiligum máti vórðu serverað, og áðrenn sjálv svimjingin byrjaði í ófýsiliga veðrinum, spældi búskaparfrøðingurin Sverri Justinussen nøkur løg á harmoniku síni, og eftir tað flutti havnarmeistarin í Runavík, Tórbjørn Jacobsen, fram røðu, sum í stóran mun snúði seg um svimjing og vantandi møguleikarnar í so máta – í økinum.

Í vikuskiftinum frammanundan hevði formaðurin í Svimjisambandinum, Jon Hestoy, eina spíska grein í bløðunum, har hann hartaði kommunalu myndugleikarnar á Skálafjørðinum fyri ikki at skipa fyritreytirnar fyri svimjing í økinum á nøktandi hátt. Hann róði í greinini framundir, at kanska fór nýggi havnarmeistarin í Runavík at boða frá onkrum nýbroti í so máta, við kommunalum mandati, tá setanarrøðan fór at verða hildin. So var ikki, mandatið var ikki til, men Tórbjørn Jacobsen var av heilum huga samdur við Jon í hansara atfinningum.



*Havnameistarin, Tórbjørn Jacobsen, ger seg til reiðar at leypa á bláman*

## Søgan um svimjingina

Torbjørn Jacobsen segði í røðuni, at ongin vitsti, nær fyrsta menniskja í heiminum hevði lært at halda sær uppi.

– Kanska var tað onkur óskettin á tíðarinnar slóð, sum av óvart hevði funnið útav, at hetta var ein møguleiki, fyri at bjarga egnum lívi, og stendur hetta í grellari andsøgn til býfluguna, sum verkfrøðiliga ikki kann flúgva, hon ger tað bara, tí hon veit ikki betur. Í okkara tíðarmáti er tað gamalt at svimja, Ezekiel og Jesajas nevna tað í heilagu skriftunum, og eisini verður talað um svimjing í Apostlasøguni, segði Torbjørn Jacobsen

– Ongastaðni er tað meira neyðugt at duga at svimja enn í Føroyum. Tað, sum upp undan fjarar, er ikki meira enn 1399 ferkilometrar til støddar, ímeðan havvíddin vit varða av er 275 túsund ferkilometrar til støddar.

– Hyggja vit hagtalsliga rátt eftir hesum tølum, er statistiski møguleikin fyri at drukna 99,5%. Hevði meira verið gjørt við hendan spurningin frá øllum síðum, ikki minst landspolitiskt og frá kommunalari síðu, hevði mong vanlukkan helst verið spard. At mangir av teimum, sum manna skip okkara, ikki duga at flóta í sjóvarmálanum, er

